# KVINNURNAR VIT GLOYMA

**TÆR** ERU NÓGVAR OG OFTA VÆL ÚTBÚNAR. MEN FØROYSKA SAMFELAGIÐ DUGIR IKKI AT TROYTA TEIRRA FØRLEIKAR – *Í MÍNUM HEIMLANDI EIGI EG AT VERA ADVOKATUR, MEN Í FØROYUM ARBEIÐI EG Í FISKI.* HETTA SIGUR EIN **ÚTLENDSK KVINNA**, SUM BÝR Í FØROYUM.



ÚTLENDSKAR KVINNUR
**Páll Holm Johannesen**
pallurin@hotmail.com

*»Tú, hon sjálv, hvat kostar eitt lítið frá tær?«* Frammanfyri útlendsku kvinnuni stendur ein skítfullur maður. Hann er í einum síðum køliskápsformaðum svørtum leðurjakka. Einari útvaskaðari Kemilux t-skjúrtu. Bláum adidas sambaskóm. Og einum 501 Levi's kovboybuksum frá 1994. Tað er 90'ára kvøld í Rex. Stóra hittið »Ooah Aaah... Just a little bit« rungar í hátalarunum. Kvinnan, hann tosar við, er fyri stuttum flutt úr Asia til Føroyar. Hon skilur ikki rættuliga føroyskt og spyr uppaftur. Tá ósjarmerandi tilboðið loksins gongur upp fyri henni, er hon kvik og svarar *»Fuck off!«*

Fáorðaður og nipin fer framligi maðurin til stroks.

Tíverri verður hetta ikki seinastu ferð, at føroysk mannfólk ganga út frá, at hon er ein skøkja. Ein kvinna, sum selir sín kropp fyri pening. Og orsøkin er einføld. Hennara dimmi húðarlitur og hennara brongluta føroyska mál. Tað er jú logikkur fyri búrhøsn, sum danir taka til. Ella í minsta lagi logikkurin hjá fleiri føroyskum monnum.

Hetta stendur millum annað at lesa í einari sosiologiuppgávu, sum setur sjóneykuna á, hvussu útlendskar kvinnur kenna seg viðurkendar og integreraðar í føroyska samfelagnum. Tað er 25 ára gamla havnarkvinnan Barbara Jacobsen, sum í sambandi við sína bacheloruppgávuna á universitetinum í Lund í Svøríki, hevur gjørt fleiri samrøður við útlendskar kvinnur, sum eru búsitandi í Føroyum.

### Kenna seg býttar

Skulu útlendsku kvinnurnar seta orð á størstu forðingina fyri at kenna seg viðurkendar í Føroyum, eru tær ikki í iva. Tað er tað føroyska málið. Kvinnurnar hava høga útbúgving, men mugu sláa seg til tols við einum láglønararbeiði í Føroyum.

– Hevði eg ikki flutt til Føroya, var eg farin til Amerika, tí har verður mín útbúgving góðtikin – eingin ivi. Men í Føroyum kemur tað ikki upp á tal. Í mínum heimlandi eigi eg at vera advokatur, men í Føroyum arbeiði eg í fiski. Eg søkti eitt skrivstovuarbeiði í

> – Eg veit ikki um føroyingar eru bangnir fyri at vit stjala teirra arbeiði. Men veitst tú hvat, føroyingar tíma ikki at gera okkara arbeiði. Arbeiðsfólkið á fiskavirkjunum eru útlendingar. Flestu vaskikonurnar eru av Filipsoyggjunum. Hví? Tí føroyingarnir vilja ikki hava tey arbeiðini

ella fært tú pengar fyri at fara í skúla. Í Noregi eru 200-300 tímar settir av til at læra málið. Í Føroyum er tað 20 tímar. Men tú kanst ikki læra stórvegis upp á 20 tímar. Hygg at børnunum. Tey fara í skúla fyri at læra teirra egna mál, fyri at læra málið væl og virðiliga. Hvat væntar tú av einum útlendingi? spyr ein av kvinnunum.

Útlendsku kvinnurnar vilja allar kýta seg fyri at lata føroyska samfelagnum nakað afturfyri, at tær hava fingið møguleikan at búgva her. At tær ikki fáa nýtt sína útbúgving, hevur við sær, at tær ikki sleppa at gagnnýta allar sínar møguleikar og kunnu harvið ikki geva nóg mikið aftur. Av tí sama kenna tær seg ikki at fáa ta viðurkenning, tær hava uppiborið.

Hetta skerir í bæði samleikan og sjálvsvirðið hjá útlendsku kvinnunum.

Havn, og tey vóru ovfarin av mínari útbúgving, men forðingin var, at eg ikki dugdi føroyskt, fortelur ein av kvinnunum.

fáa ikki neyðugu undirvísingina í føroyskum, og tað hevur stóra ávirkan á, hvussu tær kenna seg í Føroyum. Dugir tú ikki føroyska málið, er torført at gera tær dælt av tínari útbúgving. Ómøguligt at hjálpa børnunum við teirra skúlatingum. Strúggið at fylgja við, hvussu barnið hjá tær trívist í barnagarðinum. Snópisligt at fara til lækna, tá okkurt er áfatt. Ógjørligt at fylgja við í føroysku fjølmiðlunum. Og ofta verður tað hon, sum fangar skemtið seinast. Ja, vit kundu hildið leingi á.

Á persónliga økinum kenna tær eisini mótgongd. Fleiri av kvinnunum

### Vilja integrerast

Tað kemur greitt fram í kanningini, at allar tær útlendsku kvinnurnar hava ein brennandi hug at integrera seg í føroyska samfelagið. Men tað er lættari sagt enn gjørt.

– Rættindi? Nei. Arbeiðsmøguleikar? Nei. Einki (...) Í Danmark ert tú noyddur til at læra málið fyri at fáa eitt arbeiði. Har eru ókeypis skúlar,

### Friðurin

Í einum húsum í Havn býr ein kvinna úr Asia. Hon er gift føroyskum manni og hevur búð í Føroyum í nøkur ár.

– Lívið í Føroyum er avslappað. Eg elski friðsæluna. Júst friðsælan bergtók meg alt fyri eitt, tí eg hevði eitt rættiliga stressað lív, áðrenn eg koma higar, fortelur hon.

Felags fyri kvinnurnar í hesari kanningini er, at tær eru úr asiatisku londunum Teilandi, Indonesia og Filipsoyggjum. Allar búgva tær í Havn og eru giftar føroyskum monnum. Tær kenna seg væl móttiknar í teirra nærumhvørvi. Familjurnar, tær eru blivnar partur av,

▶